Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Ákærur ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við at grind er hildin til

Spurningar:

1. Er tað rætt, at ákærur eru reistar ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við kærur frá útlendskum felagsskapum, sum vilja steðga grindadrápi?
2. Um so er, hvussu er hetta gjørt og við hvørjari grundgeving?
3. Um so er, við hvørjari heimild og á hvørjum lógargrundarlagi er hetta gjørt?
4. Kann landsstýrismaðurin vátta, at alt, sum snýr seg um grundleggjandi rættin til grindadráp og aðra veiðu av villini djórum í okkara egna náttúrutilfeingi, er skipað í serstakari føroyskari lóg og reglum, sum ikki kann setast til viks av aðrari lóg?
5. Hvat hevur landsstýrismaðurin gjørt og hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera til tess at tryggja, at útlendskir felagsskapir ikki umvegis ákæruvaldið og løgregluna í Føroyum gera seg inn á grindalógina, sýslumenn, grindaformenn og grindamenn og rættin at drepa grind í Føroyum?

Viðmerkingar:
Undirritaði hevur fingið váttað, at ákærur eru reistar og sektaruppskot eru borin fram ímóti sýslumanni og grindaformonnum í Føroyum í sambandi við kærur frá útlendskum felagsskapum, ið vilja steðga grindadrápi í Føroyum. Kærurnar sigast vera reistar um ávísar hendingar, tá ið grind hevur verið hildin til, og sum skilst verður djóravælferðarlógin brúkt sum grundgeving.
Um hetta er rætt, er talan um eina sera álvarsama framferð frá løgreglu og ákæruvaldi, ið kann fáa stórar avleiðingar fyri grundleggjandi rættin at drepa grind í Føroyum og fyri sjálvsavgerðarrætt okkara at skipa burðardygga veiði av okkara egna náttúrutilfeingi. Veiða av villini djórum og livandi náttúrutilfeingi er skipað í serstakari lóg í Føroyum, og støðugt hava føroyskir myndugleikar við lóg, kunngerð og átøkum bøtt um og skipað grindadráp í Føroyum við øllum neyðugum atlitum til djór, náttúru, menniskju og samfelag.
Tí verður spurt, hvat landsstýrið veit um og ger við hetta mál, soleiðis, at tað er grindalóggávan í Føroyum, sum framhaldandi er grundarlagið fyri alla regulering av tí, ið hevur við grindarakstur, at halda grind til og at býta grind í Føroyum at gera.

Á Løgtingi, 19. november 2025

Høgni Hoydal